# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Vaknaði eftir 10 árum

**Donald Herbert (43) vaknaði brádliga leygardagin í farnu viku eftir at hava livað nærum í koma seinastu 10 árini**



*Donald Herbert er eitt medisinskt undur: Eftir at hava ligið í koma í 10 ár vaknaði hann brádliga aftur*

Hann varð skaddur, tá hann sum sløkkiliðsmaður var til arbeiðis við eldsløkking í 1995. Donald, sum eigur fýra børn, kom at liggja undir tí brannherjaða bygninginum, tá hesin datt niður.

Hann lá fyrst í koma í tríggjar mánaðir. Hann fekk skaða í heilan, sum førdi við sær, at hann gjørdist røktarsjúklingur, umframt tað at hann eisini varð blindur og stummur. Og soleiðis livdi hann fram til leygardagin í farnu viku, skrivar tíðindastovan AP.

Tá vaknaði hann brádliga, púrasta klárur og byrjaði at tosa. Tað fyrsta, hann spurdi eftir var konan, Linda.

Starvsfólkini á sjúkrahúsinum í Buffalo í USA funnu skjótt eina telefon, og samrøðan gjørdist hann fyrsta av fleiri við konuna, teir fýra synirnar, familju og vinir.

- Hann hevur hevur verið klárur fleiri ferðir, og tað gevur okkum vón um ein bata, segði Linda Herbert á einum tíðindafundi á heilsumiðstøðini í Buffalo.

Læknarnir sjálvir gjørdust sera bilsnir um hendingina, og verður hon nærum mett sum eitt medisinskt undur. Donald vaknaði aftur tríggjar mánaðir eftir at læknarnir broyttu heiligvág hansara.

# Mentamálaráðharrin sang á Tjóðpalli Føroya



*Nakrir av sangluttakarunum, f.v.: Rita Syderbø, Anna Háberg, M.C. Restorff , Jógvan á Lakjuni og Jógvan Norðbúð*

*Mynd: Tórvør Vang*

Hølini hjá Grímu á gamla Meiarínum í Tórsgøtu í Havn vóru fullsett seinasta sunnukvøld, tá samkoman Lívdin í Hoyvík skipaði fyri almennum sangkvøldi.

Á skránni var nógvur góður felagssangur, og luttakarar vóru tónleikarar úr samkomuni Lívdini, Anna Háberg og nakrir av sangarunum frá kenda Nicodemus-sangbólkurin frá 70-unum, ið sungu fleiri gamlar slagarar sum t.d. "Hin gamli maðurin" og "Tú leitar".

Teir sum mannaðu Nicodemus sangbólkin hetta kvøldið vóru: M.C. Restorff, Jóannes á Váli, Jógvan Norðbúð og mentamálaráðharin Jógvan á Lakjuni.

Annars var tónleikur og sangur fyri bæði ung og eldri. Fyrireikararnir vóru væl nøgdir við sangløtuna, og áhoyrararnir tóku væl undir við sanginum. Tiltakið byrjaði kl. 20 og endaði umleið kl. 22 við at øll sungu "Breið verndarveingir tínar".



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

# Endurskin úr Álandi

**Fríggjadagin læt upp ein serstøk framsýning í Listaskálanum við álendskari list**

FRAMSÝNING
*Snorri Brend*



**Havn:** Framsýningina nevna tey “Reflexer från Åland i Nordisk Triangel”.

Talan er um eitt rættiliga stórt úrval av list úr hesum oyggjabólkinum, tí ikki færri enn átta listafólk eru við á hesi framsýningini.

Á framsýningini sýna tey fram málningar, vatnlitsmyndir og grafikk, eins og tey hava við sær listarverk við blandaðum tøkni.

Tey átta, ið sýna fram eru Keathy Ericsson-Jourdan, Kkjell Ekstrøm, Guy Frisk, Isa Hallstrøm, Lill-Anne Kull, Jonas Wilén, Monique Lundberg og Nanna Sjøstrøm.

Framsýningin í Listaskálanum er opin fram til 5. juni.